# BØNARLØTAN

MARS 2024 39. árg.



*Lili og Brian á veg í nýggjan ættarbólk!*

***1. Fríggjadagur*** ***Sálm. 120 og 121***

## PAPUA NÝGUINEA
### Lili og Brian Poulsen
### Elliot 7, Jude 5, Evelyn 3, Olivia 0

Familjan Shaiebly er afturkomin til PNG eftir eitt ár í farloyvi. Vit tosa nú við aðra familju, ið eisini skal arbeiða saman við okkum. Biðið, at Gud signar samstarvið, nú vit búgva okkum til at fara út í ein ættarbólk at boða evangeliið.

## KRINGVARPIÐ

28. mars kl. 16 sjónvarpsmøti, Siloa, Fuglafjørður
7. apríl kl. 17 útvarpsmøti, Ebenezer
17. mars og 7. apríl, sjónvarpsandakt, Jóhan við Neyst

## EVANGELISKA RØDDIN á ras2.fo (meir á www.evr.fo)

Sunnukv. kl. 21 ........Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskv. kl. 21 ............Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

## *2. Leygardagur* — *Lukas 20.27-47*

### DANMARK
### Anna og Hans Djurhuus

Føroyskt møti verður 2. mars kl. 19 í Bethaniakirkjuni, Dag Hammarskjøldsgade 2A, Aalborg, og danskt møti á Malta 3. mars kl. 18. Vit verða í Føroyum um páskirnar og nakað út í apríl.

## *3. Sunnudagur* — *1. Sám. 24.1-23*

### Vanja og Svein í Prestgarði
### Svend 15, Terji 11, Petra 10



Fyrst í mars verða vit partur av evangeliskum tiltaki í høllini í Sarons Dal. Hálvan mars vitja vit Bergen í eina viku. Vit gleðast um tíðindi úr Noregi, at fólk eru komin til trúgv, endurnýggjað og lívgað.

### ZAREPTA

Biðið fyri samkomulegunum!

## 4. Mánadagur Gal. 1.1-24



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Nógv er á skránni, og fyrireikingarnar til páskamøtini eru byrjaðar. Biðið, at møtini verða væl vitjað, og at gleðiboðskapurin røkkur inn í hjørtuni.

**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Josva 14, Ester 13, Samuel 9**
**– Dora og Niels Pauli Nónstein, Andreas 14, Kristina 13**
**– Danjal og Synnøve av Rana, Anna Emilie 9, Lukas 3**

## 5. Týsdagur 1. Sám. 25.1-22



**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

Eg skal undirvísa í eini samkomu her í Montgomery, og seinni skal eg víga eitt par í Florida. Brúðurin er ommudóttir systur Judy. Í apríl luttaki eg á stevnuni í Tailandi fyri NTM-leiðarar í Asia, har vit hava trúboðarar. Nógv fyrireikingararbeiði liggur fyri framman.

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

Biðið fyri Ástjørn, at Gud signar verkið! - at nóg nógv børn koma, at nóg nógv starvsfólk koma, sum elska Gud og elska orð Hansara, og at Gud gevur okkum vísdóm og alt, sum tørvar.

## *6. Mikudagur* *Gal. 2.1-21*

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**

Eg verði í Florida 6-13. mars til trygdarfundir fyri trúboðarar. Rachel og eg vitja í Týsklandi 13. mars - 2. apr. Vit gleða okkum at síggja tvíburarnar hjá Natalie og Philip.



**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Victoria 17, Emma Grace 16,**
**Jónatan 14, Markus 11, Evita 9, Joy 7**

Biðið, at Harrin hjálpir og styrkir Guicho og Chuy at tæna sum elstir í samkomuni.

## *7. Hósdagur* *1. Sám. 25.23-44*

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 3, Selah Rose 1**

Í hálvaaðru viku vitja vit Benjamin og Philip, beiggjar Dániel, og familjur teirra í Týsklandi og koma so til Føroya 8. mars saman við Steffan, beiggja Daniel. Vit gleða okkum at síggja fleiri tykkara. Krissy og børnini fara til USA 18. mars, og 27. mars fara Daniel og Steffan. Biðið fyri ferðunum.

## *8. Fríggjadagur* *Sálm. 122 og 123*



**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**

Biðið fyri STEVN, og at Gud gevur okkum vísdóm, sum vit flyta tænastu okkara meira inn í Pakistan og knýta samband við lyklapersónar har.

**OM, SUÐURAFRIKA, Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**
**Hanna 0**



Toymi okkara telur bara 11 fólk í løtuni, íroknað leiðarahjúnini og køksfólk. Eg eri byrjað aftur í niðursettari tíð eftir barnsburðarfarloyvi. Skurðurin er sanniliga stórur, men arbeiðsmenninir eru fáir. Okkum tørvar fólk í langtíðartænastu, sum hava hjarta fyri verkinum.

## *9. Leygardagur* *Gal. 3.1-29*

**DANMARK, Kristnastova**
**Sólva og Jákup Hansen**

Í dag er undirvísingarleygardagur í Kristnastovu; Johann Petersen luttekur. Biðið, at hetta verður til signing fyri samkomuna, og at vit framvegis fáa náði og styrki at tæna menniskjum í navni Jesusar.

**Susan og Øssur Berghamar**



Andaktirnar á sjúklingahotellinum eru týðandi í tænastuni millum sjúklingar og avvarðandi, tí har gevast høvi at stuðla, samtala og biðja fyri fólki og teirra ymisku tørvum. Tað er torførari enn áður at finna, hvar fólk eru, og tí seta vit stóran prís upp á gott samskifti við tykkum heima. Takk fyri forbønir tykkara. berghamar@kristnastova.dk

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Noah 17, Lydia 7**

## *10. Sunnudagur* *1. Sám. 26.1-25*



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**
Stephen fekk longt uppihaldsloyvið eitt ár. Hjálpararbeiðið í jarðskjálvtaøkinum heldur fram. Meira enn eitt ár er nú síðani jarðskjálvtan, og nógv búgva enn í fyribils bingjum og tjøldum. Stórur opinleiki og áhugi er fyri at hoyra meira um Jesus í hesum økinum. Ramadan er 10. mars - 8. apríl. Her fæst ein Prayer guide: www.pray30days.org/

## *11. Mánadagur* *Gal. 4.1-11*



**DANMARK, Kolding**
**Anne og Jan Zachariassen**
Í mars eru vit nakrar dagar á stevnu í Belgia. Arbeiðið við bíbliuumsetingini heldur fram, og vit hava møtir í Rødovre og Fredericia.



**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**
Okkara ukrainsku brøður og systrar í Glostrup Frikirke royna at finna seg til rættis í Danmark. Kríggið hevur vart í tvey ár, og tey stúra fyri heimlandinum. Latið okkum saman við teimum biðja um frið.

## *12. Týsdagur* *1. Sám. 27.1-12*



**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Rebekah 16, Lydia 14**

Fleiri enn 10 trúboðarafelagsskapir luttóku á hugnaligum miðmála í London, tá handbókin *Personal Support Matters* varð løgd fram. Stimbrandi vitnisburðir vórðu lutaðir. Biðið, at teir trúboðarar, ið vanta fíggjarligan stuðul, fáa gagn av bókini. Claire undirvísir á ráðstevnuni *Network Forum* í Malaga í apríl. Biðið fyri fyrireikingunum; nógv av tilfarinum er ikki nýtt áður.

## *13. Mikudagur* *Gal. 4.12-31*



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

Um Gud vil byrja summarlegurnar 27. juni og verða 4 vikur fram. Starvsfólk kunnu seta seg í samband við Marjun tel. 275181. Manning at sigla við Juvel kann seta seg í samband við Páll tel. 215181. Biðið fyri legunum.
Juvel verður umvældur í Kollafirði; arbeitt verður hvønn leygard. Øll hjálp kærkomin. Kunning frá Gordon Martin Midjord, tel. 595900 og Jóanes Norðberg, tel. 2222909. Biðið, at arbeiðið verður liðugt til páskir!

**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**
Eg kom til Skotlands 22. feb. at hitta familju og vinir í tríggjar vikur, áðrenn eg fari á Moorland bíbliuskúla í Onglandi 13. mars at undirvísa á málskeiði. Biðið eisini fyri Sue, sum arbeiðir við týðingini saman við toyminum í Oaxaca.

## *14. Hósdagur* — *1. Sám. 28.1-25*

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**
Stálkonstruktiónin og tekjan til útbygningin á samkomubygninginum eru liðug. Vit fyrireika nú næsta byggistig. Biðið um vísdóm og dirvi, nú Ivor og leiðslubólkurin arbeiða víðari við verkætlanini. Guðrun trívist væl í arbeiðnum og nýtur samfelagið við arbeiðsfelagar.

*Í dag fyllir Kristina Nónstein 13 ár

## *15. Fríggjadagur* — *Sálm. 124 og 125*



**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Ansa og Arnold Mortensen**
**Ewelina 14**
Vit hava nú opið hús fyri ung annaðhvørt fríggjakv. Biðið, at bæði donsk og føroysk ung luttaka. Árliga legan verður á páskum. Tilmelding á www.malta-lejr.dk

**FØROYAR**
**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**

**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**

## *16. Leygardagur* — *Gal. 5.1-26*

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**
16. mars halda vit 40 ára dagin fyri føroyska kristiliga verkinum í Odense. Vit hava øll hesi árini virkað fyri andaligum umhvørvi fyri føroyingar á Fyn. Biðið, at fólk kenna seg leidd at koma saman um Guds Orð á hjarta- og móðurmálinum.

**FØROYAR**
**Birgit og Svenning av Lofti**
**Atlantic Mission, Juvel II**
27 luttakarar hava teknað seg at vera við í evangeliseringsferðini til Randers um páskirnar. Biðið fyri ferðini.




**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**

*Í dag fyllir Evita Tuohy 9 ár
*Í dag fyllir Lydia Berghamar 7 ár

## *17. Sunnudagur* — *1. Sám. 29.1-11*

**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 13, Leah 10, Abigail 5**
Í dag er fyrsta sunnudagsmøtið í nýggju samkomuni. Áhugin er stórur. Takk fyri forbøn! Biðið, at tey taka ímóti evangeliinum.

Jóhannes er í Føroyum við yngstu dóttrini 15. apr. - 1. mai. Hann vitjar samkomur og kunnar um tænastuna í Frankaríki. Biðið fyri vitjanini.

## *18. Mánadagur* — *Gal. 6.1-18*



**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 12, Emma 7**
Biðið fyri einum hjúnum. Dóttir teirra gongur í sama flokki sum Emma, dóttir okkara. Kvinnan hevur verið gift fyrr, og tí loyvir katólska kirkjan henni ikki at luttaka í messum. Hetta hevur gjørt, at tey eru vorðin sera opin mótvegis okkara samkomu og fyri evangeliinum.

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 10, Micah 10**

## *19. Týsdagur* — *1. Sám. 30.1-31*

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**
Í næstum fer Augustin at seta upp partar av Bíbliuni á saafi máli. Í løtuni verða kort, orðalistar o.a. eftirkannað. *Vinir Jesusar* spyrja Harran um leiðslu viðv. næsta stigi at røkka sínum egna fólki.

## *20. Mikudagur* — *Filemon 1-25*

**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 6, Timon 4, Manuel 0, Salome 0**

Tvíburarnir vórðu føddir 26. jan. Teir trívast væl, men tað er lítil svøvnur hjá Natalie og mær. Fleiri í týsku samkomuni gera okkum døgurða hendan mánaðin. Vit vilja tryggja tvíburunum bæði týskan og amerikanskan ríkisborgararætt og royna at fáa pass og visa at fara aftur til PNG. Vit halda fram at læra kovolmálið, sum tíðin loyvir okkum.

## *21. Hósdagur* *1. Sám. 31.1-13*



**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 13, Tabita 10, Debora 8, Natan 5**

Eydna og Dávur Johannesen leiða toymið við 21 fólkum á Reach 21-25. mars. Samuel og Malvinus eru á bíbliuskúla í North Cotes í løtuni. Biðið, at fleiri fara á bíbliuskúla komandi ár.



**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**

Tørvur verður á meir fólki í ár at hjálpa til á legunum, tí fleiri í samkomuni verða burturstødd. Familjulega 5-11. juli, barnalega 12-18. juli, ungdómslega 19-25. juli, outreach 28. juli – 3. aug.

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

**Elam Ministries, Evropa**
**Margretha Højgaard Poulsen**

*Í dag fyllir Trisha Guttesen 12 ár

## 22. Fríggjadagur — Sálm. 126 og 127

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**
Árliga trúboðarastevnan REACH verður 22-24. mars. www.ntm.org.uk/event/reach-2024/. Nógv er at fyrireika, og okkara bøn er, at tey ungu verða eggjað. Eg undirvísi á NTM skúlanum um bíbliuumseting 4-20. mars.



**ONGLAND, European Christian Mission**
**Dorit og Simon Marshall**

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 12**

## 23. Leygardagur — Lukas 21.1-19

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**
Eini 10 næmingar búgva hjá samverkafólkum okkara á Balabac. Hetta er óhøgligt. Biðið, at vit finna eina góða loysn.

## 24. Pálmasunnudagur — 2. Mós. 29.22-46

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**
Fyri at fáa samband við yanomami ættina aftur, keypa vit nú internetantennu og sólpanel. Á henda hátt fáa vit aftur samband við fólkið og fara undir miðvísa læru í samkomuni.

## *25. Mánadagur* *Lukas 21.20-38*

**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Ungi umsetarin og eg halda fram at rættlesa Nýggja Testamenti. Fyrstu umsetingarnar krevja nógvar ábøtur; arbeiðið gongur væl, men tekur tíð. Vit eru fyri sera nógvum ágangi í løtuni á øllum frontum. Tað er vanligt, at hin óndi herjar ógvusliga á, tá Nýggja Testamenti er um at verða liðugt. Biðið, at Harrin styrkir og varðveitir okkum nær hjá sær, og at vit hava eyguni vend á hann.

## *26. Týsdagur* *2. Mós. 30.1-16*



**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 14**

Forsetin avlýsti tjóðartingsvalið, sum skuldi vera 25. feb. Nú verður tosað um, at valið verður síðst í mars ella fyrst í apríl, so vit bíða spent eftir, hvat fer at henda. Vit hava tað gott og kenna okkum trygg.

## *27. Mikudagur* *Lukas 22.1-23*



**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 15, Noah 14, Karis 10, Judah 8, Ethan 6**

Eftir tríggjar mánaðir í Stórabretlandi skuldu vit fara aftur til PNG, men fara nú aftur til USA í mai, tí Noah skal hava eina skurðviðgerð aftrat. Seinkanin ørkymlar, men vit líta á Harran. Biðið fyri okkum.

## *28. Skírhósdagur* *2. Mós. 30.17-38*

**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**



Liz hevur enn nógva pínu av fallinum í nov. Læknar í Manila hava roynt at finna orsøkina, men til fánýtis. Tískil flyta vit nú, helst til La Trinidad, norðan fyri Manila, har vit hava búð fyrr. Haðani kunnu vit framhaldandi arbeiða við undirvísingartilfarinum. Eg fari so aftur til bygdina at gjøgnumganga tilfarið saman við við mínari manning. Nú longist okkum eftir at gera tilfarið um Rómbrævið liðugt saman við trúføstu vinum okkara.

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Hanna 15**

*Í dag fyllir Lydia Niclasen 14 ár

## *29. Langi fríggjadagur* *Sálm. 128 og 129*

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 14, Nana 12, Louie 10, Rio 4**
Nógv av okkara arbeiði er í og út frá samkomuni. Vit gera nú broytingar í samkomuleiðsluni og biðja um Guds vegleiðing og vísdóm.

**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 12, Noah Kristian 10**
Vit takka, at mong innan leiðslu og umsorgan í Asia luttóku í febr. Biðið, at innfararloyvi okkara verða endurnýggjað í apríl.




## OM, LOGOS HOPE, TeenStreet

Fyrireikingar til summarið eru byrjaðar. TeenStreet verður í Týsklandi 26. juli - 2. aug. Tilmelding á teenstreet.fo. OM skipar fyri tveimum missiónsferðum: Tey 14-17 ára gomlu fara til Póllands at arbeiða við flóttafólkum úr Ukraina 2-10. august, t.v.s beint eftir TeenStreet. Eitt toymi fyri fólk eldri enn 18 ár fer til Dürres í Albania 27. juni - 9. juli. Tilmelding er á om.fo. Tey fara at stuðla samkomuarbeiði har og arbeiða við fólki við serligum tørvi.

| | |
|---|---|
| Útgevari | KBS (Kristniboðssambandið) |
| Blaðnevnd | Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest og Sigurð Ó. Vang. |
| Avgreiðsla | Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057 |
| Uppseting | Grafikmaster, tel. 502022 |
| Myndasavn | info@grafikmaster.fo |
| Prent | Føroyaprent, tel. 314555 |
| Teldupostur | prayerservicefo@gmail.com |
| Heimasíða | www.kbs.fo |

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## *31. Páskadagur* — *2. Mós. 31.1-18*

### BÓKATÆNASTAN
Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!

### PÁLMARASAMKOMAN (2014)
**462 síður   350 kr.**

Pálmarasamkoman – við tíðartalvu og landkortum – er sanna søgan um samkomulív teirra bíbliutrúgvu í samfull 2000 ár, frá hvítusunnudegi til tjúgundu øld. Flest okkara vita, at veruliga kirkju- og samkomusøgan er ikki tann, ið skrivað verður um í verðsligum søgubókum. Klassiska bókaverk E.H. Broadbents avdúkar hitt sanna hjartað ígjøgnum tíðirnar.
Páll R. Poulsen týddi.




FORLAGIÐ LEIRKERIÐ

Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo